## Stór bryggja

Tórshavnar Havn fekk trý tilboð upp á arbeiðið at gera nýggja bingjuhavn á Oyrareingjum í Kollafirði. Tað lægsta tilboðið var frá J&K Petersen, sum hevur boðið sær til at gera arbeiðið fyri 53,7 mió. krónur umframt 11,5 mió. krónur fyri eftirlit, projektering og aðrar útreiðslur. Atløgusíðan verður 150 metrar long, og har verður eitt 21.500 fermetrar stórt asfalterað øki umframt 20.500 fermetrar, sum eisini verða tøkir.

## Eingin kekkur

Tey, sum høvdu gingið og glett seg til at fáa barnakekk frá tí almenna, noyðast at brynja seg við toli, tí tey fáa ongan kekk á hesum sinni. Landsstýrismaðurin Bárður Nielsen hevur tikið uppskotið um barnakekkin aftur, tí starvsfelagi hansara í almannamálum arbeiðir við onkrum í sambandi við barnastuðul, og tað kemur í heyst, sigur Útvarpið. Hetta merkir, at verandi barnafrádráttur í skattinum er framvegis galdandi.

# Skálatrøð einskiljast í 30-60 ár

**Nú er tíðin búgvin at gera eina heildarætlan fyri økið á Skálatrøð. Eftir ætlan skal Skálatrøð leigast privatum í 30-60 ár og á býráðsfundi hóskvøldið fer Tórshavnar Býráð at taka støðu til málið**

BÝARMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skálatrøð skal vera ein sonn perla í Havnini og tað skal gerast á privatum grundarlagi*

Skálatrøð einskiljast í 30-60 ár Tórshavnar Býráð ásannar, at stórur áhugi er fyri at sleppa at gagnnýta Skálatrøð á annan hátt enn í dag, har so at siga alt økið verður nýtt til alment parkeringspláss.

Býráðið heldur nú, at tíðin er búgvin til at eina heildarætlan fyri Skálatrøð og økið rundanum Skálatrøð og í hesi ætlanini, skal stingast út í kortið, hvussu økið skal nýtast, hvussu byggjast skal, hvussu ferðslan skal skipast o.s.fr.

Og hetta skal gerast soleiðis, at ætlanirnar verða framdar í verki innanfyri eitt lutfalsliga stutt áramál.

Býráðið heldur, at tað hevur týdning, at almenningurin fær atgongd til havnafrontin og verður rætt atborið, kann Skálatrøð gerast ein sonn perla mitt í høvuðsstaðnum, til gagns fyri bæði borgarar, vinnulív og mentunarlív.

Tí mæla tekniski stjórin í býráðnum, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin til at útskriva eina projektkapping í Føroyum og hinum Norðanlondum um at gera eina heildarætlan fyri økið, og at fremja ætlanina í verki.

Tann, sum vinnur kappingina, fær ræðisrætt á økinum og skal fremja heildarætlanina við eini langtíðar leiguavtalu á 30 til 60 ár. Tá ið leigumálið er úti, skal Tórshavnar Kommuna yvirtaka alt økið fyri eina ávísa upphædd, sum verður ásett samráðingum við tann, sum leigar økið.

Í hesi ætlanini skulu bygningar sum eru verdir at varðveita, ikki takast burtur, men skulu kunna brúkast til eitthvørt endamál.

Samstundis skulu privatar ognir verða við í heildaruppskotinum, so nógv, sum til ber.

Samstundis kann upp til 25-30% av sjógvøkinum fyllast út at byggja á, men talið á smábátaplássum má í mesta lagi minka 10%, ella 30pláss.

Í løtuni eru 210 parkeringspláss á Skálatrøð og har skulu í mesta lagi 10% takast burtur.

Annars skal framtíðarbygging á Skálatrøð fevna um bygging til mentanarendamál, høli til fundir, skeið og ráðstevnur, stevnur og framsýningar, móttøkur og veitslur, konsertir, fyrilestrar, skrivstovur til borgaravendar tænastur, so sum kunningarstova, ferðaskrivstovur, almennar ella kommunalar borgaratænastur, skrivstovur, men feløg sleppa ikki at leggja høvuðssæti við Skálatrøð.

Byggingin skal eisini fevna um handlar, matstovur, náttarlív, hotel,

Samanumtikið skal Skálatrøð verða eitt sjónligt og eyðkendur varði fyri Tórshavn sigur Býráðið og hóskvøldið fer Býráðið at gera av um kappingin skal útskrivast ella ikki.

# Nú fáa fleiri bygdir Televarpið

**Nú er navn sett á tær bygdir, sum fáa høvi at síggja Televarpið í ár og næsta ár, men alt veldst kortini um fíggjarligur gongdina**

TELEVARP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gongst sum ætlað, fer at bera til at síggja Televarpið í fleiri bydum í ár og næsta ár*

Nú er greitt, hvørjar bygdir afturat kring landið, fáa høvi til at síggja Televarpið í ár og næsta ár.

Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, bað herfyri landsstýrismannin í samskiftismálum, Bjarna Djurholm, greiða Løgtinginum frá nøkrum viðuskiftum í sambandi við Televarpið

Sandoyartingmaðurin vísti á, at enn eru stórir partar av landinum, sum ikki hava møguleikan at síggja Televarpið, eitt nú Suðuroy og Sandoy

Bjarni Djurholm greiddi frá, at sendinetið hjá Televarpinum verður útbygt í tann mun tað letur seg gera á einum burðardyggum grundarlagi.

Í ár er ætlanin at røkka til Lamba, Sands bygd, Skúvoy, Froðba, Tvøroyri, Trongisvág, Vág, Nes, Akrar og Lopra og Porkeri.

Og næsta ár er ætlanin eisini at knýta Hvalba, Sandvík, Sumba og Árnafjørð upp í sendinetið. Kortini verður dentur ladur á, at ætlanin veldst um fíggjarligu viðurskiftini, tí Televarpið skal rekast á vinnuligumgrundarlagið.

Hinvegin er útbyggingin fyri 2009 og 2010 ikki endaliga fastløgd enn, segði Bjarni Djurholm.

## Bingjuhavnin á Oyrareingjum byggjast út

**Hóskvøldið fer Tórshavnar Býráð at taka støðu til at byggja umstíddur bingjuhavnina á Oyrareingjum út**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*Aki@sosialurin.fo*

Nú verður ferð sett á arbeiðið at byggja eina stóra farmahavn á Oyrareingjum.

Tórshavnar kommuna kom fyri nøkrum árum síðani til tað niðurstøðu, at Oyrareingir er besta plássið í Tórshavnar Kommunu at byggja eina framtíðar farmahavn á.

Og á býráðsfundi hóskvøldið fer Tórshavnar Býráð at taka støðu til eitt uppskot um at gera økið størri og at byggja eina stóra farmahavn á Oyrareingjum.

Sum økið á Oyrareingjum liggur beint nú, er tað einar 35.000 fermetrar og nøktar sostatt bráneyðuga tørvin.

- Tørvurin á framtíðar havnaøki er ringt at meta um, men møguleiki er at víðka økið á Oyrareingjum til einar 200.000-300.000 fermetrar.

Men nú fer býráðið so at viðgera eina ætlan um at fara undir 1. byggistig av eini farmahavn á Oyrareingjum.

Hetta umfatar ein bryggjukant upp á 150 metrar við einum dýpi upp á 14 metrar. Á havnarlagnum verður eitt økið upp á 25000 fermetrar asfalterað til bryggju og bingjur.

Arbeiðið er boðið út og løgsta tilboðið hevði J&K Petersen, sum kann gera arbeiðið fyri 53,7 milliónir, men annars væntar býráðið, at 11,5 milliónir koma afturat til projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar og ymiskt óvantað.

Og hóskvøldið fer býráðið so at taka støðu til um arbeiðið skal gerast og um 65,2 milliónir skulu játtast til endamálið.